# Lestrarráðið á SFD

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 15.06.2016**

**Á fundi:** Sunrit Niklasdóttir (forkvinna), Súsanna M. Mortensen, útbúgvingarleiðari, Súsanna Herdalur Tausen, limur, Daniella Joensen, lesandi, Liljan Witt, skrivari Marjun Gaardlykke, lesandi (næstforkvinna)

**Ikki møttar:** Guðrið Vesturgaard, lesandi, Karin Elisa Djurhuus, lesandi

**Fundarfrásøgn 15. juni 2016, kl. 9-11**

Fundurin byrjar við morgunmati.

1) Góðkenning av fundarskrá
**Góðkend**

2) Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn
**Góðkend**

3) Viðgera núverandi mannagongdir í samband við eftirmeting av undirvísing (ástøðispartin).
   - Hví eftirmeta undirvísing og útbúgving (Stutt upplegg frá SHT)
   - Kjak um hvørjar royndir útbúgvingarleiðari, lesandi og starvsfólk hava av núverandi eftirmetingarleisti og amboð (allir limir fyrireika seg til at luttaka aktivt í kjakinum)
   - Reflektera og koma við møguligum uppskotum til, hvussu vit framhaldandi menna eftirmetingaramboð og leist fyri ástøðispartin.

**SHT vísir á, at tað eru tveir formar fyri evaluering, lærarar evaluera lesandi og lesandi evaluera útbúgvingina. Til dømis eru próvtøkur, ein máti at eftirmeta lesandi. Tað er neyðugt fyri útbúgvingina, at lesandi eisini eftirmeta.**

**Eftir Bologna skal lesandi vera ein sentral rødd í eftirmetingini.**

**SHT vísti á at í DK hevur man eitt evalueringsinstitutt – EVA, sí: https://www.eva.dk/**

**Lesandi í ráðnum heldur, at eftirmetingin er ov lang (ov nógvar síður við ov nógvum punktum) og við tað at eftirmeting er við endan á hvørjum moduli er ofta torført at minnast tað man skal eftirmeta. Umstøðurnar at eftirmeta eru ofta ikki góðar – sita til dømis í einum fríkorteri og gera tað og tá kemur fyri at man ikki gevur sær neyðugu tíðina til at útfylla skjalið neyvt. man setur bara krossin onkustaðni. Tvs. tað er vandi fyri at útbúgvingin ikki fær reellar eftirmetingar frá lesandi.**

# Lestrarráðið á SFD

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**Lesandi síggja týdningin av at man evaluerar útbúgvingina, og at man her hevur møguleika at gera vart við nøkur ting, við at kunna skriva viðmerkingar.**

**Ein evalueringsbólkur á skúlanum har SN og SHT eru í situr í løtuni og arbeiður við at menna eftirmetingarskjøl og leist og bólkurin vil taka hesi innput við í tað arbeiðið. SHT og SN nevna, at tað eru fleiri mátar at eftirmeta uppá – fokusbólkar, delphi-metodan, 1-minutt eftirmeting, essay osfr. *Ætlanin er, at bólkurin seinni í ár ger eitt útkast viðv. eftirmetingarambodum og leisti til Lestrarráðið at umrøða.***

**<u>Viðmerking til eftirmetingarbólkin frá lesandi</u> er, at tá tað eru skrivaðir tveir ymiskir lærarir á sama skjali, so er ringt at svara eftirmetingarskjalinum; týdningarmikið at rudda upp í hesum, so vit fáa neyvari eftirmetingar. Ein møguleiki at royna, er at lesandi eftirmeta beint eftir undirvísingin er liðug.**

4) Royndarkoyra góðkenning av útbúgvingarprofilinum til masterútbúgvingina, sum byrjar í heyst[1] (*allir limir fyrireika seg til at luttaka aktivt í viðgerðini*).

**Útbúgvingarfrymulin verður diskuteraður. Semja er um, at tá vit framyvir skulu viðgera og góðkenna útbúgvingarprofilar, er gott at halda læruúrtøkurnar upp í móti endamál, førleikum og hinum punktunum í profilinum.**

5) Ymiskt

- Taka avgerð um mannagongd viðv. góðkenning av umsøknum um góðskrivan til masterútb í heyst (*SN innleiðir*)

**Tey, sum hava tikið stakskeið á Setrinum, kunnu søkja um at fáa góðskrivað skeiðini, so tey gerast partar av masterútb. í fólkaheilsuvísind. Eftir reglunum, skal Lestrarráðið viðgera og góðkenna allar umsøknir um góðskrivan, men við tað, at vit ikki møtast aftur fyrr enn 7. septembur, er neyðugt, at finna aðra loysn her. Ráðið er samt um, at SN, vegna lestrarráðið, góðkennir umsøknirnar um góðskrivingar.**

- Annað

**Flokkarnir eru samdir um at lesandi í Lestrarráðnum eisini umboða tey í samstarvsnevndini. Avgjørt er tí at *samstarvsnevndin við lesandi + SMM og JD hava fund 7 september kl. 11:00 til 12:00***

**Til komandi fund, fara vit at diskutera leistin til praktikkbýtið.**

Fundarlok kl. 11.15 (LW)

---

[1] Talan er ikki um eina formella góðkenning, tí profilurin er longu sendur til MMR. Viðgerðin av profilinum, skal síggjast sum lærustøða í okkara menning at góðkenna komandi profilar.